## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Skiftandi skýloft og ælaveður. Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði. Hitin liggur millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin**
Skiftandi skýloft við ælingi. Lot til andøvsgul eystaneftir. Út á dagin meira skýggjað, og fríggjanáttina verður helst regn, og vindurin veksur upp ein strúk av landnyrðingi. Hitin verður millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Yvirskýggjað við regni av og á. Andøvsgul til strúk í vindi av landnyrðingi. Út á kvøldið klárar í, og vindurin minkar niður í gul til stívt andøvsgul. Hitin millum 5 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin**
Mest turt og møguliga nakað av sól. Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði, sum út á sunnudagin gongur í útnyrðing og minkar nakað. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Ein stjørna er sloknað

**Tann í føroyska fiskiflotanum so væl kenda Morning Star av Strondum varð í seinastu viku togað út av Vágsfirði og søkt**

VERÐSINS GONGD
*Edvard Joensen*



*Morning Star varð í seinastu viku sleipað út av Vágsfirði og søkt*

Eisini Morning Star mátti at enda lúta fyri tíðarinnar tonn. Hon er avriggað og søkt. Sleipað út av Vágsfirði, har hon endaði sínar dagar á havsins botni.

Hetta stolta farið, sum í áravís hevur drigið so nógv upp úr havinum, varð nú latið hesum sama havi aftur. Hon var ikki tíðarhóskandi meira. Uppfylti ikki tey krøv, sum nútíðar fiskimaðurin - av røttum - setir. Veiðiloyvið varð flutt á annað far, og Morning Star avriggað.

John Thomsen á Strondum hevur seinasta mannaminni ella so átt og ført Morning Star. Hann seldi skipið nakað fyri jól í fjør til felagið Line Fish við Norðskála, sum skal brúka veiðiloyvi til línuskipið Thomas Nygaard. Morning Star varð síðan seld Vágs Skipasmiðju, sum tók úr og av skipinum slíkt, skipasmiðjan kundi brúka, og síðan varð skrokkurin søktur.

Alt hevur sína tíð, staðfestir John Thomsen. Og soleiðis var eisini við Morning Star, sum útgjørd var til snelluveiðu. Hon hevur verið í hesi driftini í rættiliga nógv ár nú, og hava seinnu tíðina, síðan snellurnar gjørdust teldustýrdar, vanliga verið einir fimm til sjey mans við skipinum. Fyrr var vanligt við upp til 10 monnum. Morning Star hevði 14 snellur.

Seinnu nógvu árini hevur Morning Star bara veirð á ísfiskaveiðu, men umleið 1970 vóru teir eini fýra ár ella so til saltfisk undir Íslandi við henni. Tá var meira fólk við, eins og tað eisini var, tá teir vóru við gørnum.

Umstøðurnar umborð vóru ikki tær, sum fólk í dag vil hava, greiðir John Thomsen frá. Hóast lugarið var rættiliga gott, krevst meira í dag, og tí var ikki altíð líka lætt at fáa fólk.

– Eg haldi heldur ikki, at tað er rætt at gerast gamal við einum gomlum skipi, og tí gjørdi eg av at selja, sigur hann.

Morning Star var norsk. Hon varð smíðað úr furu í 1940 og var eitt av hesum ferniseraðu træskipunum, føroyingar kenna so væl, hóast hon her í Føroyum hevur verið hvít á liti. Morning Star var 114 bruttotons til støddar og hevði, nú hon varð seld, ein 200 HK M.W.M. motor frá 1970 ísettan.

Nógv fólk hevur gjøgnum tíðirnar verið við Morning Star, sigur gamli skiparin, sum heldur, at hann tekur ikki ov nógv til, um hann sigur, at mestsum allur ungdómurin á Strondum man hava verið onkran túr við Morning Star í byrjanini av síni sjómanstíð.

Hóast Morning Star er seld, hevur John Thomsen líkasum hug at halda seg til snelluveiðuna kortini. Hann hevur fingið sær ein minni bát. Ein 29 føt Hvalvíksbát, sum hann hevur róð út við í vár.

– Tað er heilt øðrvísi drift, hóast reiðskapurin er tann sami, heldur hann. Men prísin fýlist hann á.

– Hann er lækkaður heilt munandi í ár, vísir John Thomsen á. Sjálvur hevur hann bara fingið einar10,-krónur í meðal brutto. Eisini tá tann stóri toskurin er íroknaður. So har er veruliga ein broyting farin fram.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 13 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -- |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | -- |
| Moskva | -- |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | -- |
| Bukarest | -- |
| Paris | 14 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 20 |
| Athen | -- |
| Malta | 26 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 17 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst yvir Norðsjónum gongur í ein landnyrðing. Veðrið komandi dagarnar verður merkt av høgætt við skiftandi skýlofti og ælingi. Eitt annað lágtrýst nærkast vestaneftir og verður væntandi yvir Skotlandi fríggjadagin og fer síðan suðuryvir. Tað hevur skýggjaloft og regn við sær, og vindurin frískar hósdagin og fríggjadagin.




Leygardagin kemur ein hátrýstryggur væntandi vestan eftir móti Føroyum, og tí kann væntast nakað av sól um vikuskiftið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/05 kl. 06⁰⁰– 20/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,1°
Minsti hiti máldur í mai: ÷3,0° Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/05 kl. 06⁰⁰–20/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 58,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

15. mai: Mánin næstur jørðini
16. mai: Fullmáni
23. mai: Seinna kvarter
28. mai: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 21. mai | — | 12.07 | 11.07 | 23.34 | 11.22 | 23.49 | 01.41 | 14.07 | 02.41 | 15.07 | 10.22 | 22.49 | 09.22 | 21.49 | — | 12.22 | 00.56 | 13.22 | 11.52 | — | 00.41 | 13.07 |
| 22. mai | 00.34 | 12.59 | 11.59 | — | - | 12.14 | 02.34 | 14.59 | 03.34 | 15.59 | 11.14 | 23.50 | 10.14 | 22.50 | 00.49 | 13.14 | 01.49 | 14.14 | 00.19 | 12.44 | 01.34 | 13.59 |
| 23. mai | 01.35 | 14.12 | 00.35 | 13.12 | 00.50 | 13.27 | 03.35 | 16.12 | 04.35 | 17.12 | — | 12.27 | 11.27 | — | 01.50 | 14.27 | 02.50 | 15.27 | 01.20 | 13.57 | 02.35 | 15.12 |
| 24. mai | 02.47 | 15.22 | 01.47 | 14.22 | 02.02 | 14.37 | 04.47 | 17.22 | 05.47 | 18.22 | 01.02 | 13.37 | 00.02 | 12.37 | 03.02 | 15.37 | 04.02 | 16.37 | 02.32 | 15.07 | 03.47 | 16.22 |

5 707265 100036 >